

*- Fólkakirkjan er stóra yvirtøkan, sum samgongan hevur sett sær fyri. Fólkakirkjan verður á føroyskum hondum 1. januar í 2007, segði løgmaður í røðu síni á ólavsøku í ár. Men hvør skal avgera, hvat tann føroyska kirkjan skal boða í framtíðini? Tað er ein av teimum stóru spurningum, nú ein trímannabólkur fyrireikar yvirtøkuna av Fólkakirkjuni*
*Mynd: Bárður*

# Fólkakirkjan verður ein av teimum st

**Í løgmansrøðu síni á ólavsøku lovaði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, at Fólkakirkjan verður yvirtikin 1. januar 2007. Hóast arbeitt hevur verið hesi yvirtøku síðani 1998, væntar løgmaður, at hesaferð fer tíðarætlanin at halda. Ein broyting verður helst, at prestarnir ikki longur vera tænastumenn**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*

- Fólkakirkjan er stóra yvirtøkan, sum samgongan hevur sett sær fyri. Fólkakirkjan verður á føroyskum hondum 1. januar í 2007.

Hesi orðini segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, í Løgtinginum ólavsøkudag, tá hann helt ta árligu løgmansrøðuna.

Sum so er tó einki nýtt í hesum. Samgongan, ið nú situr, er nevniliga ikki tann fyrsta, sum hevur sett sær hetta mál. Núverandi samgonguskjal er nevniliga tað triðja í røðini, sum hevur sett sær fyri at yvirtaka Fólkakirkjuna. Longu í 1998 setti táverandi samgonga við Anfinni Kallsberg á odda sær fyri at yvirtaka Fólkakirkjuna, og skuldi hetta henda í ár 2000. Eisini tað næsta samgonguskjalið, sum Anfinn Kallsberg var við til at undirskriva sum løgmaður í 2002 setti sær fyri at yvirtaka Fólkakirkjuna.

Triðju ferð, Fólkakirkjan varð nevnd sum yvirtøka í einum samgonguskjali, var í fjør, tá Jóannes Eidesgaard varð valdur til løgmann, og hesaferð vildi Sambandsflokkurin vera við til at yvirtaka kirkjuna.

Í samrøðu við Sosialin vátta bæði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, og Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, ið umsitur kirkjumál, at alt nú "gongur, sum tað skal við hesum máli", og at tað helst fer at eydnast hesaferð at halda ta ásettu tíðarfreistina, sum altso gongur út um einar 16 mánaðar. 1. januar 2007 er dagurin, tá Føroya kirkja verður føroysk.

Løgmaður sigur, at hann hevur fult álit á, at alt er, sum tað eigur at vera í hesum máli.

## Halda fast við sjálvboðið arbeiði

Í løtuni situr ein trímannabólkur við tveimum løgfrøðingum hjá Mentamálaráðnum og einum løgfrøðingi hjá Føroya Stiftsstjórn og arbeiða við at fyrireika lógirnar, sum skulu galda, tá kirkjan skal yvirtakast.

Harafturat hevur ein kirkjuligur fylgibólkur, sum er mannaður av bispi, dómprósti, formanninum í Felagnum fyri kirkjuráðslimir og formanninum í Prestafelagnum fylgt arbeiðinum, umfram at ein politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum flokkum somuleiðis hava verið eygleiðarar.

Maria Húsgarð, løgfrøðingur og fulltrúi í Mentamálaráðnum, er ein av limunum í arbeiðsbólkinum, og hon sigur í samrøðu við Sosialin, at tey eru komin langt við tí lógarfyrireikandi arbeiðinum, og at hóast eingin lóg er liðug at viðgera enn, so er tað sambært henni sannlíkt, at 1. januar 2007 verður dagurin, tá Fólkakirkjan verður yvirtikin.

Hvussu kirkjan skal fíggjast í framtíðini, sigur Maria Húsgarð, at her verður hugt eftir, hvussu til ber t.d. at krevja inn kirkjuskatt. Í samgonguskjalinum verður sagt, at ein vil gjalda allar útreiðslur hjá kirkjuni, og er hetta tilsamans einar 15 milliónir fyri umvælingar og lønir.

Fyrireikararnir av yvirtøkuni vilja ikki siga møguleikan frá sær at hækka kirkjuskattin, men ætlanin er ikki, at kirkjan ikki skal løna alt ov nógvum fólkum ella gerast alt ov dýr. Tvs. politiskt er ynskiligt, at hildið verður fram, sum ein ger í Føroyum í dag, har t.d. nógv arbeiði, t.d. kórsangur, er sjálvboðið. Í fleiri av okkara grannalondum verða lønir hinvegin rindaðar til eitt nú kirkjusangarar. Her kann nevnast, at kirkjuskatturin í Føroyum er 0,4 %, meðan t.d. danir gjalda 0,8 %.

Um serligur tørvur er á peningi í onkrari bygd, sókn ella kommunu, ber tó til sambært Toll- og Skattstovu Føroya at áseta lokalan kirkjuskatt.

## Prestar ikki longur tænastumenn

Sum nú er, eru prestarnir í Føroyum danskir tænastumenn, men Maria Húsgarð væntar, at eftir eina møguliga yvirtøku fara teir at kunna velja, um teir vilja halda fram sum danskir tænastumenn, ella um teir vilja koma undir eina føroyska skipan. Slíkt er eisini roynt við øðrum yvirtøkum.

Prestar, sum verða settir í embæti eftir yvirtøkuna fáa tó ikki hendan møguleika.

Maria Húsgarð nevnir, at